*Løgmaður og Nyrup tosaðu um markið*

# Marknatrætan fyrsta prioritet

*-Nú avtalan við donsku stjórnina er fingin upp á pláss, verður tað mest týðandi málið, sum eg fari at taka mær av; marknatrætan við bretar sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum mikumorgunin umrøddi málið við Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra.*

JAN MULLER

Stutt eftir at avtalan millum Føroyar og Danmark varð undirskrivað tíðliga mikumorgunin hevði Anfinn Kallsberg, løgmaður fund við Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra um marknamálið.

Á fundinum kunnaði Nyrup løgmann um, hvat hann og bretski forsætisráðharrin, Tony Blair tosaðu um mánakvøldið. Nyrup segði løgmanni, at hann og Tony Blair samdust um at venda aftur til marknamálið, eftir at nýggja landsstýrið hevur viðgjørt tað og kemur til eina niðurstøðu, um hvussu farast skal víðari fram.

**Til verka beinanvegin**

Anfinn Kallsberg sigur, at marknamálið skal loysast, nú avtalan við Danmark er komin undir land.

-Vit fara til verka beinanvegin. Hetta málið fær avgjørt fyrsta prioritet sigur løgmaður.

Longu í næstu viku kemur Árni Olafsson, leiðari í samráðingarnevndini, til Føroya og skal hann viðgera marknamálið saman við løgmanni.

Nú Nyrup og Blair hava tosað um marknamálið spurdu vit Anfinn Kallsberg, um hetta merkir, at áheitanin frá undanfarna løgmanni um at fáa marknamálið upp á hægsta politiska stig, nú verður tikin til eftirtektar - ella um tað kann bera í sær, at embætismannanevndirnar aftur seta seg við samráðingarborðið at gera enn eina roynd?

-Tað er júst hetta vit skulu viðgera og finna út av. Vit mugu finna fram til, hvar vit standa í øllum hesum. Skal málið uppá hægsta politiska støðið, so má ein eisini vita, hvat ein skal viðgera har. Lat okkum ikki nú leypa fram av men leggja hetta til rættis á mest skynsama hátt.

**Nýtt útspæl**

Løgmaður heldur tað vera rímuligt at venda málinum og taka tað upp aftur til viðgerð, nú eftir at bæði Bretland, Danmark og Føroyar hava fingið nýggjar stjórnir. Komandi fundirnir í landsstýrinum skulu rudda slóð fyri, hvussu eitt komandi útspæl skal síggja út

Eisini skal Uttanlandsnevndin, sum eisini er nýggj, kunnast um málið og takast við uppá ráð.



*Tony Blair og Nyrup umrøddu markið mmillum Føroyar og Bretland á fundi í Keypmannahavn mánakvøldið*

# Blair og Nyrup tosaðu um undirgrundarmarkið

JAN MULLER

Tá danski forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen og bretski starvsbróðurin Tony Blair hittust í Keypmannhavn mánakvøldið at tosa um ES-spurningar brúktu teir eisini ein part av tíðini til at tosa um marknatrætuna millum Føroyar/Danmark øðrumegin og Bretland hinumegin.

Teir báðir samdust sambart Útvarp Føroya týskvøldið um at bera so í bandi, at gongd kemur á samráðingarnar um undirgrundarmarkið, og at tær verða fluttar upp á politiskt stig.

Higartil hava embætisfólk tikið sær av samráðingunum. Poul Nyrup segði við útvarpið, at tað vóru hvørki tíð ella stað til at samráðast beinleiðis um marknamálið mánakvøldið, men hann kendi tað sum eina uppgávu, eisini eftir avtaluna við landsstýrið, at heita á bretska stjórnarleiðaran til konstruktivt at fara inn í samráðingarnar, víðariføra samráðingarnar frá bretskari síðu.

-Eg kann siga somikið, at eg fekk greitt varhugan av, at Tony Blair er hugaður fyri, at vit kunnu halda fram við samráðingunum millum bretsku stjórnina, teir relevantu ráðharrarnar har, landsstýrið og donsku stjórnina.

Uppá fyrispurning um tað kann koma ein skjót loysn á málið, nú føroyingar eru so altráðir at fara í gongd við eina oljuvinnu sigur Poul Nyrup Rasmusssen, at hetta er sera torført at meta um. -Men tað var mín varhugi frá fundinum við Blair mánakvøldið, at bretski forsætisráðharrin hevði eina positiva støðu til at víðariføra samráðingarnar í einum konstruktivum anda, og tað rokni eg við, at vit nú fara at síggja gerast veruleiki uppá ein skilagóðan hátt.

Tað var fyrrverandi landsstýrismaðurin Edmund Joensen, sum í januar mánað heitti á Poul Nyrup Rasmussen um at taka málið upp við Tony Blair. Herfyri segði nýggi løgmaður Anfinn Kallsberg, at nýggja landsstýrið vildi lata spurningin hvíla, til tað hevði kunnað seg við málið.

Tað eru annars bert fáir dagar síðani, at bretski uttanríkisráðharrin,Robin Cook í einum hjartaligum brævi til løgmann segði seg vóna, at marknamálið kundi loysast sum skjótast og til gagn fyri bæði londini.

**Løgmaður boðin at vitja Noreg**

Tilboðið til Føroya løgmann at vitja Oljunoreg stendur við. Undanfarni løgmaður Edmund Joensen var boðin at vitja Noreg og síggja oljuvinnuna har, men hann settist aftur í Vágum orsakað av vánaligum veðri. Nú siga tíðindi úr Noregi, at innbjóðingin stendur við. Erling Grimstad, politiskur ráðgevi hjá norska oljumálaráðnum, sigur, sambart útvarpinum, at norskir myndugleikar hava gjørt sær nógvar royndir í oljuvinnuni seinastu 25 árini, og teir eru nú tilreiðar at greiða føroyingum frá teimum.

Erling Grimstad sigur seg vóna, at Føroyar og Noreg kunnu samstarva á oljuøkinum eins og tey gera á fiskivinnuøkinum. Enn er ikki avgjørt, nær løgmaður fer til Noregs. Tó roynir norska sendistovan í Keypmannahavn, sum eisini umsitur Føroyar, at finna ein hóskandi dag til vitjanina.

Norski forsætismálaráðharrin Kjeld Magne Bondevig segði annars við Sosialin herfyri, at um Føroyar fingu sín egna oljumálaráðharra eftir valið, so fór innbjóðingin eisini at verða send til hansara.

